ISBN 99918-971-0-0

# Rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi til fiskivinnuna

Gestur Hovgaard, Ph.D.

&

Hallbera West, Stud.Scient.Pol

**ARBEIÐSRIT NR. 4/2003**

Um arbeiðsrit:

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýbd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði sum granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

## Innihaldsyvirlit

Formæli ... 3
1. Inngangur ... 5
1.1. Frágreiðingin í stuttum ... 6
2. Hægri útbúgving, flyting og nútímans tilveran ... 6
Mentanarfaktorurin ... 10
Arbeiðsmarknaðarfaktorurin ... 10
Persóns- og tíðarfaktorurin. ... 11
Politikk- og tænastufaktorurin ... 11
2.1. Framferðarháttur ... 11
Val av respondentum ... 12
Viðtalsmannagongd ... 13
Data-greining ... 14
3. Lýsing av respondentum ... 14
3.1. Hvørja bakgrund hava respondentarnir? ... 14
3.2. Hví hava tey valt ta útbúgving, tey hava? ... 15
3.3. Flyta heim ella ikki? ... 17
3.4. Samanumtøka ... 19
4. Hvat við fiskivinnuni? ... 20
4.1. Mentanarfaktorurin ... 20
4.2. Arbeiðsmarknaðarfaktorurin ... 21
4.3. Persóns- og tíðarfaktorurin ... 23
4.4. Politikk- og tænastufaktorurin ... 24
4.5. Hvat hevur týdning fyri rekruttering til fiskivinnuna – samanumtøka ... 25
5. Rekruttering av høgt útbúnum til fiskivinnuna - Tilmæli ... 25
5.1. Tey, ið fara undir hægri lestur ... 26
5.2. Tey, ið lesa uttanlands ... 27
5.3. Tey, ið starvast uttanlands ... 29
5.4. Endi ... 31
6. Samanumtøka og niðurstøður ... 31
Keldulisti ... 34
Fylgiskjal 1. ... 36

## Formæli

Í seinnu helvt av árinum 2002, fór Granskingardepilin fyri økismenning undir eina verkætlan: "Rekruttering til fiskivinnuna", hvørs yvirskipaða endamál er at viðgera spurningin um ungdóm, útbúgvingarval og framtíðina hjá føroysku fiskivinnuni. Verkætlanin tekur støði í tí andsøgn, at samstundis sum alt fleiri ung velja fiskivinnuna frá í teirra vali av lívsleið, so er tað alt meiri viðurkent, at tað eisini framyvir er fiskivinnan, vit skulu seta okkara lít á. Men tað er eitt heilt annað slag av fiskivinnu enn ta, vit kenna, talan verður um. Tí samstundis, sum tað er ein minkandi tørvur á fólki í veiðuliði og vanligari fiskaframleiðslu, vaksa krøvini til okkara førleika sum fiskivinnutjóð. Krøv um burðardygga menning, nýggj marknaðarkrøv, nýggja tøknifrøði, nýggjar matvørur, nýggir stýringshættir og økt krøv til arbeiðsviðurskifti og -umhvørvi, eru bara nøkur av teimum fyribrigdum, sum troka seg framat. Alt hetta merkir, at fiskivinnan hevur ein alt størri tørv á førleikamenning, og er hetta galdandi fyri øll lið í vinnuni.

Hendan frágreiðingin er onnur av íalt 4, sum samlaða verkætlanin um "Rekruttering til fiskivinnuna" umfatar. Tær næstu frágreiðingarnar verða tøkar seinni í 2003. Hendan frágreiðingin setir spurningin, hvussu vit fáa ta hægst útbúnu arbeiðsmegina, t.v.s. tey við universitetsútbúgvingum, at starvast innan fiskivinnuna. Grundarlagið fyri kanningini er viðtal við fólk, sum standa yvir fyri ella hava roynt valið, at flyta til Føroya og møguliga at taka upp starv í fiskivinnuni. Vit takka hjartaliga teimum, sum vit hava havt viðtal við.

Strembað er eftir at skriva frágreiðingina soleiðis, at ymisku partarnir kunnu lesast sum sjálvstøðug íkast til kjakið um rekruttering av teimum hægst útbúnu til fiskivinnuna. Tann, sum hevur áhuga á tí teoretisku tilgongdini og framferðarháttinum, fær mest burturúr at lesa part 2. Sjálv lýsingin av innsavnaða tilfarinum verður gjørd í pørtunum 3 og 4, meðan tilmælini verða gjørd í parti 5. Partur 6 er ein stutt samanumtøka og niðurstøða av allari frágreiðingini.

Verkætlanin "Rekruttering til fiskivinnuna", er stuðlað av Fiskivinnuroyndum, Búagrunninum, Kósini P/F, Pure Water P/F, JFK Trol P/F, Delta Seafood, Sandoy

Seafood, United Seafood og Fiskavirkinum í Gøtu. Vit takka fyri stuðulin og vóna, hann kemur fiskivinnuni til góðar.

Klaksvík, apríl 2003

Gestur Hovgaard, Ph.D.
Verkætlanarleiðari

# 1. Inngangur

Í grein í tíðindabrævinum Hugin & Munin, viðger fiskifrøðingurin Rógvi Reinert spurningin um akademisku arbeiðsmegina og hennara viðurskifti við fiskivinnuna. Tað verður staðfest, at sera fá fólk við høgum útbúgvingum velja sær starv innan vinnuna, og greinskrivarin undrast á, hví eitt fólk við siðvenju í fiskivinnuni velur útbúgvingar innan hetta økið frá, og – mest undranarvert – hví sjálvt fólk við relevantum fakum fyri vinnuna, heldur fáa sær starv aðrastaðni[1].

Hendan frágreiðingin fer inn á tað tema og teir spurningar, sum Rógvi Reinert setir. Hon viðger spurningin, hvat skal til at fáa høgt útbúnu arbeiðsmegina at velja sær starv í fiskivinnuni? Spurningurin er neyðugur, tí ein menning av vinnuni er nær tengd at vitan, sum bert kann røkkast gjøgnum útbúgvingar á hægri stigi. Skal fiskivinnan gerast ein vinna, sum framleiðir til eitt nú ein nútímans matvøru- og heilsuídnað, er neyðugt við fólki við grundleggjandi kemiskari og biologiskari vitan. Skulu vit liva upp til støðugt vaksandi krøv um altjóða standardar, altjóða skipanir og skiftandi marknaðartreytir, er neyðugt við fólki við kunnleika í lógarverki, marknaðarføring, umsiting og samfelagnum annars. Spurningurin ber samstundis við sær, at rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi her verður sæð sum nakað, ið vinnan, tað almenna og aðrir viðkomandi partar mugu gera eitt virkið arbeiði til at fáa fatur í. Við øðrum orðum, so er uppáhaldið tað, at vit í stóran mun hava hesa arbeiðsmegina, men at hon av einhvørjari orsøk ikki starvast í vinnuni! Spurningurin er tí eisini, hví hon ikki ger tað? Eru avbjóðingarnar ov fáar, lønirnar ov lágar, er arbeiði í fiskivinnuni heilt einfalt ov keðiligt, ella er frágreiðingin ein heilt onnur?

Umframt endamálið, at greina viðurskiftini millum høgt útbúnu arbeiðsmegina og fiskivinnuna, skulu vit á hesum grundarlagi eisini geva tilmæli um, hvar og hvussu vinnan og tað almenna kunnu seta inn, til tess at gera fiskivinnuna til eitt áhugavert arbeiðspláss fyri tey hægst útbúnu.

[1] Tíðindabrævið Hugin & Munin, 3/2002. Við høgari útbúgving meinast fólk við akademiskum førleika frá universiteti ella líknandi lærustovni.

### *1.1. Frágreiðingin í stuttum*

Ein fortreyt fyri at koma nærri einum svari upp á høvuðsspurningin, er at greina, hvat tað serliga er við hægri útbúgvingum og høgt útbúnum fólki, sum ger tað neyðugt, at seta virkið rekrutteringsarbeiði í verk. Svarið upp á hendan spurningin er ástøðiliga grundarlagið undir sjálvari frágreiðingini, og er viðgjørt í parti 2.0. niðanfyri. Viðgerðin av sjálvum høvuðsspurninginum, verður bygt á eina kanning fyrst og fremst millum føroyingar búsitandi uttanlands. Tey hava viðkomandi hægri útbúgving, ella eru væl ávegis við eini hægri útbúgving. Vísindaliga grundarlagið er tað kvalitativa háttalagið, bygt á samrøður við viðkomandi respondentar, og verður hesin framferðarhátturin greinaður nærri í parti 2.1. Í parti 3 verða almennir spurningar um bakgrund, útbúgvingarval og flyting viðgjørdir, meðan tað í parti 4 verður farið nærri inn á viðurskifti viðvíkjandi rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi í fiskivinnuna. Við støði í útgreiningunum í parti 3 og 4, umfatar partur 5 tilmæli um, hvat kann gerast til tess at styrkja rekruttering av høgt útbúnari arbeiðsmegi inn í føroysku fiskivinnuna. Partur 6 tekur saman um frágreiðingina og høvuðsniðurstøðurnar.

## 2. Hægri útbúgving, flyting og nútímans tilveran

Um allan vesturheimin verður útbúgving fyri tann einstaka sæð sum mest neyðuga barlastin at skapa sær eina framtíð og "tað góða lívið". Hetta er eitt medvit, sum skapast í heilt ungum árum, og okkara kanning millum føroyskan ungdóm í 9. flokki vísir, at omanfyri 90% av hesum árgangi greitt ætlar sær at taka eina formliga útbúgving[2].

Í valinum av formligum útbúgvingum finna vit eitt avgerandi svar uppá, hví ungdómurin gongur frá útjaðara móti miðdepli (Arbo 1998:33). Tað er í miðdeplinum, at útbúgvingarplássini finnast, og hetta fer fram í einum tíðarskeiði í lívinum, har tann einstaki finnur út av, hvat og hvar viðkomandi vil við sínum lívi. Kappingin um at vinna hendan ungdómin aftur, er tí vorðin ein minst líka týdningarmikil avbjóðing fyri framtíðina hjá einum tilfeingisøki ella tilfeingissamfelagi, sum atgongdin til rávøru, kapital, tænastur og marknaðir (Arbo 1997:319ff). Hetta verður sett í eitt størri høpi, tá

[2] Her verður sipað til eina størri spurnarblaðskanning í røðini um rekruttering til fiskivinnuna.

eisini verður hugsað um, at tað langt síðani er viðurkent, at jú hægri útbúgvingarstøði eitt samfelag hevur, jú hægri er tess livistøði. Og av somu orsøk hava flestu lond tí ein sera virknan útbúgvingarpolitikk. Samstundis fer fram ein altjóða kapping um at draga til sín høgt kvalifiseraða arbeiðsmegi, har serliga OECD-londini njóta væl av henni, og skapa sær eitt "brain-gain", meðan tapararnir - menningarlondini – eru fyri einum "brain-drain" (Cervantes og Cuellec, 2003).

Føroyar, sum eitt útjaðarasamfelag í Norðurhøvum, eru uttan iva væl fyri á útbúgvingarliga økinum, og talið av teimum, sum nema sær hægri útbúgvingar er støðugt vaksandi. Greitt er tó, at ein stórur partur av føroyska ungdóminum nemur sær hægri útbúgving í einum øðrum samfelagi enn tí, tey eru vaksin upp í. Hetta ger kappingarstøðuna nakað øðrvísi, enn um talan í størri mun var um flyting frá útjaðara til miðdepil innanhýsis í Føroyum. Í so máta líkist støðan í Føroyum støðuni hjá nógvum menningarlondum, har tey høgt útbúnu nema sær sín kunnleika í Europa og USA. Tað er tó tann avgerandi munurin, at vit ikki tykjast hava stórar trupulleikar at vinna meginpartin av hesum fólkum aftur, samanborið við aðrar útjaðarar. Men tá tey so flyta heim aftur, seta tey allarflestu seg niður í føroyska miðdeplinum, t.v.s. at flytingin frá útjaðara til miðdepil í Føroyum, í stóran mun fer fram um eitt "millumland", Danmark serliga.

Gjøgnumgongdin higartil sigur okkum so mikið, at tá vit tosa um væl útbúgvið fólk, er talan um fólk, ið eru sera flytfør. Høgt útbúna arbeiðsmegin kann tí – um enn fýrkantað sett upp - síggjast sum ein "vøra", ið hevur lætt við at flyta millum størv, millum lond og millum øki. Skulu vit hava eitt svar upp á, hví tað er flytføri, ið eyðkennir fólk við útbúgving, og serliga hægri útbúgving, mugu vit gera eitt legg inn í sosiologiska hugsanarháttin.

Fara vit bara nøkur fá áratíggju aftur í tíðina, var tað tann geografiska, sosiala og kynsliga bakgrundin, sum var leiðbeinandi fyri val av arbeiði og lívsførslu hjá tí einstaka. Útbúgving var bara unt teimum fáu og oftast teimum frammanundan priviligeraðu. Valið av lívsleið hjá teimum allarflestu var sostatt nær tengt at siðvenjum, har genturnar t.d. blivu húsmøður eins og mammurnar, og dreingirnir blivu fiskimenn

eins og páparnir. Valið av bústaði – herundir møgulig flyting - var tengd at, hvar arbeiði var at fáa, og tilkomandi ungdómurin so at siga vaks seg inn í lokalsamfelagið. Rekrutteringin av næsta ættarliði var sostatt bundin at staðnum, t.v.s. at teimum náttúrubundnu møguleikunum, sum fiskivinnu og landbúnaði, umframt sjálvsagt tí lokalu mentan, tengd var at hesum vinnum.

At hendan siðvanda lívsleiðin nærum er brotin, sæst aftur í, at tað í dag eru ógvuliga fá børn, sum velja sær sama lívsstarv sum foreldrini. Hetta er bara eitt dømi um, at nútíðar tilveran er eyðkend av einum nógv øktum individualiteti og skapan av tí, Anthony Giddens kallar "sjálvidentiteti" (Giddens 1991; sí eisini Ziehe 1989). Við hesum meinast m.a., at núverandi ættarliðið hevur ein vinnuligan og mentanarligan pall at veksa upp á, sum í vavi er heimsfevndur og í møguleikum er nærum ótømandi. Núverandi ættarliðið er tí tað fyrsta, sum í høvuðsheitum er "frígjørt" frá siðvenjum og har møguleikarnir at velja egnu framtíð – eisini í høvuðsheitum - eru fullkomuliga opnir. Tað er hendan grundleggjandi samfelagsbroyting, sum ger, at modernaða tilveran nú kann sigast vera vorðin "refleksiv" (Giddens 1994; Beck 1992).

Við "refleksivitet" meinast - stutt sagt - at lívið er vorðið eitt støðugt val millum nógvu møguleikarnar, og tvingar hetta tann einstaka til alla tíðina at taka støðu til sítt umhvørvi og til sín sjálvs (t.v.s skapan av sjálvidentiteti). Tað merkir tó ikki tað sama sum, at ein og hvør hevur møguleikan at skapa sær tað "góða lívið", og heldur ikki at tann einstaki mennist í einum sosialum tómrúmi. Tað merkir, at skapanin av tí einstaka alla tíðina fer fram í einum slagi av samskifti við siðvenjur, familju og lokalsamfelag, og er sjálvsagt eisini tengt at teimum búskaparligu møguleikunum hjá tí einstaka. Frígeringin frá siðvenjunum er ein frígering frá einum felagsskapi, sum mangan hevur verið kúgandi, men samstundis hevur givið tí einstaka ein nærleika og ein tryggleika, tann einstaki hevur kunnað grundað sítt lív á. Opinleikin og valmøguleikarnir í "refleksiva" samfelagnum hava, hóast frígering, eisini við sær eina óvissu og ein ótryggleika, har tann einstaki so at siga er bundin av at velja rætt, og tí verður nútímans samfelagið eisini kallað eitt "váðasamfelag" (Beck 1992).

Tann samfelagspallur í "váðasamfelagnum", ið meira enn nakar annar samansjóðar tilveruna hjá tí einstaka, er tann alt meira fjølbroytti "útbúgvingar- og arbeiðspallurin". Útbúgving er meira enn nakað annað, tað fyribrigdið, sum er vorðið ein bót fyri nærleika- og tryggleikatapið, ið refleksiva tilveran førir við sær (Hovgaard 1998). Útbúgving er í stóran mun fyritreytin fyri "at blíva til nakað", hon er ein fyritreyt at klára seg væl á arbeiðsmarknaðinum, og ein fyritreyt fyri at realisera sínar dreymar. Og tí er útbúgving eisini lykilin til eitt sjálvstøðugt og óheft lív hjá tí einstaka. Enn meiri avgerandi er kanska, at ein gjøgnum útbúgvingina – sum í veruleikanum byrjar á heilt ungum árum – tekur á seg ein fullkomiliga øðrvísi samleika enn tann, sum knýttur er at tí staðbundna høpinum (fiskarí, landbrúki, húsarhaldi v.m). Hesin samleiki er alt meira knýttur at sjálvari útbúgvingini og sjálvsagt tí starvi, ið útbúgvingin gevur rætt til. Staðfestast kann eisini, at jú hægri útbúgvingin/starvið er, tess størri týdning fáa hesi viðurskifti fyri samleikan hjá tí einstaka. Simonsen (2000) fer víða og heldur uppá, at tann útbúgvingin, ein núverandi ungdómur velur, er fyrst av øllum eitt samleikaval, ikki eitt val av einum ávísum førleika.

Tá útbúgving og tað harvið avleidda starvið gerst avgerandi samleikaskapandi fyribrigdi, so er sjálvsagt, at onnur samleikaskapandi fyribrigdi sum heimstaður, familja, mentan og søga fáa ein minkandi týdning fyri val av lívsleið. Hetta merkir ikki, at hesi ongan týdning hava, men tað merkir júst, at valið millum t.d. at flyta til Føroya ella verða verandi í Danmark gerst eitt "refleksivt" val, t.v.s. eitt val har nógvir fyrimunir og vansar vera vigaðir hvør móti øðrum.

Hvørji viðurskifti avgera so búsetingarval hjá einum við útbúgving, og serliga einum við hægri útbúgving? Hjá tí løgfrøðingi ella búskaparfrøðingi, sum ætlar sær at starvast innan føroyska almenna umsiting, er valið helst lættari enn hjá tí, ið er fiskivinnufrøðingur ella lívfrøðingur við serligum áhuga fyri gransking í fiskasjúkum. Einfalda orsøkin er, at tað er so nógv lættari at fáa eitt umsitingarligt starv enn eitt granskarastarv. Men vit mugu spyrja, um tað ikki eisini eru familjan, føroyska náttúran, heimstaðurin, ella sosiala og mentanarliga umhvørvið, ið hava týdning, tá ein avgerð um at finna sær starv í Føroyum skal takast?

Flytingarmynstur mugu nevniliga síggjast sum eitt nógv dynamiskari fyribrigdi enn ein einfaldur streymur frá útjaðara móti miðdepli. Hóast ongin ivi er um, at jú hægri útbúgving ein hevur, jú størri fyrimun hava størri býirnir og europeisku høvuðslondini, so er veruleikin eisini, at streymurin gongur báðar vegir. Summi øki ella býir í útjaðaranum (og her síggja vit Føroyar sum ein evropiskan útjaðara), hava evnini at draga fólk til sín og skapa eitt umhvørvi fyri eitt nú hægri útbúgvin fólk, hóast onnur samanberandi øki/býir ganga aftur. Vit kunnu siga, at tað harvið mugu finnast "strategiskir fyrimunur" hjá einum útjaðara sum Føroyum at vinna ta høgt útbúnu arbeiðsmegina. Spurningurin er, hvørjir hesir fyrimunir eru?

Við støði í kjakinum omanfyri, kunnu vit peika á 4 faktorar, sum kunnu hava týdning fyri fyri at velja Føroyar sum bústað hjá teimum, sum hava eina hægri útbúgving.

## *Mentanarfaktorurin*

Við hendan faktorin meinast partvíst tað vit omanfyri hava kallað "siðvenjan", t.v.s. tey viðurskifti, sum hava við tær staðbundnu umstøðurnar, ein er vaksin upp í, at gera. Virka familja, náttúra ella sosialu/mentanarligu bondini sum dragandi ella frástoytandi viðurskifti? Hinvegin hava vit sjálvandi tann núverandi samtekstin við sínari mentan. Her er ein eyðkend støða tann stóri býurin, ið hevur eitt breitt útboð av mentanarupplivingum, tænastutilboðum og øðrum stórbýarágóðum, sum ein útjaðari ógvuliga illa kann kappast við.

## *Arbeiðsmarknaðarfaktorurin*

Vit vita, at Føroyar eru í eini kapping um hægst útbúnu arbeiðsmegina, og at hesi fólk seta serlig og stór krøv til sítt arbeiði. Men hvørji eru hesi krøvini? Er tað løn, frítíð, ávirkan, ágóðar ella innihaldið í arbeiðinum, sum er tað avgerandi fyri at velja eitt starv í Føroyum? Finnast hesir møguleikar í nóg stóran mun á føroyska arbeiðsmarknaðinum? Og tað er eisini spurningurin um, hvar ein arbeiðir, og hvørjum arbeitt verður við. T.v.s. at tað er/er-ikki líkamikið, um tú arbeiðir í Havn ella á bygd, er/er-ikki líkamikið um vøran/tænastan er fiskur ella okkurt annað?

*Persóns- og tíðarfaktorurin.*

Tá vit tosa um fólk við hægri útbúgvingum, so eru tað – um enn framvegis á ungum árum – ofta fólk, ið antin eru í ferð við ella hava fingið sær familju. Tá tey fara undir útbúgving, koma tey til eitt nýtt umhvørvi, sum ávirkar tey og kanska fær tey at føla seg heima. Oftani búgva tey í nógv ár í sama umhvørvi, soleiðis at tey sláa røtur har og skapa sær her ein nýggjan "staðbundnan samleika" saman við tí samleika, sum útbúgvingin gevur teimum. Harumframt gevur nýggja umhvørvið og útbúgvingin teimum eitt persónligt net, sum bindir tey til tann nýggja staðbundna samtekstin. Hevur hendan nýggja bindingin nógv at siga, ella er tað hinvegin so, at tey varðveita og kanska styrkja síni sambond við til tann gamla samtekstin (t.v.s. Føroyar/heimstaðin)?

*Politikk- og tænastufaktorurin*

Við hendan faktorin meinast teir karmar, sum t.d. arbeiðsmarknaðar-, sosial- og mentanarpolitikkurin eru. Tá flyting kemur upp á tal, so spæla sjálvandi altíð aðrir fyrimunir enn sjálvt arbeiðið inn. Eru t.d. barnaansingarspláss, eru skúlarnir nóg góðir, og er tryggleikin á arbeiðsmarknaðinum nóg høgur, o.s.fr? Hesin faktorur hevur greitt við tann almenna politikkin at gera (lands- eins og kommunalpolitikkin), og ikki minst, hvussu samanspælið er millum alment og privat virksemi.

Teir faktorar, vit her hava sett upp, yvirlappa í veruleikanum og ávirka hvønn annan, og tí er flokkingin ikki eintýðug. Uppbýtið skal tí síggjast sum eitt amboð til at skipa innsavnaða tilfarið eftir, og skulu vit venda aftur til hetta í parti 4.

## 2.1. Framferðarháttur

Vanliga skilur man í samfelagsfrøði millum kvantitativa og kvalitativa gransking. Har tann kvantitativa granskingin byggir á mátingar við støði í talviðgerðum, so merkir kvalitativ gransking, at høvuðsdenturin verður lagdur á meiningar, symbol, hugsanir og lýsingar. Tað er stór ósemja millum fak og fakbólkar, hvat háttalag nú einaferð er best, eitt kjak vit ikki skulu nema her. Men okkara tilgongd til hesa samfelagsvísindaligu ósemju er, at háttaløgini stuðla hvørjum øðrum, og at valið av øðrum ella møguliga báðum, er tengt at tí spurningi ella hypotesu, ein arbeiðir við. Ì hesi uppgávuni hava vit

valt at brúka kvalitativa háttalagið, og grunda framferðina á samrøður (interview). Tað eru orsøkirnar til hetta valið, og hvussu vit eru farin fram, ið skulu lýsast nærri í hesum partinum.

*Val av respondentum*

Fyri at kanna, hví fólk við hægri útbúgvingum velja eitt starv í fiskivinnuni frá, hava vit valt respondentar (svargevar), ið kunnu býtast í tríggjar bólkar. Fyrsti bólkur umboðar fólk, ið starvast við fiskivinnu í øðrum londum, men eins væl kundu starvast í Føroyum. Ein annar bólkur eru tey lesandi, sum kunnu siga okkum, hví tey velja útbúgvingar/fak innan fiskivinnu ella ikki. Triði bólkurin eru tey, sum hava útbúgving av týdningi fyri fiskivinnuna, men hava valt onnur størv framum.

At finna fram til hesi fólkini var ikki so einfalt, tí tað bar ikki til at finna málbólkin í nøkrum yvirliti ella databasu. Eitt nú er onki fullfíggjað yvirlit yvir føroyingar uttanlands, og einki yvirlit sum býtir fólk upp í starvsbólkar.

Stuðulsstovnurin er uttan iva tann stovnur, ið hevur flestar upplýsingar um lesandi uttanlands. Teirra skipan hóskaði tó ikki til at finna fram tær neyvu upplýsingar, vit høvdu brúk fyri. Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) hevur databasu yvir sínar limir, sum vit fingu møguleika at síggja. Onkur persónur av týdningi fyri okkum, kundi finnast tann vegin, men talan er um ein heldur ófullfíggjaðan databasa, m.a. við vantandi dagføring av limunum. Í triðja lagi nýttu vit telefonbókina yvir útisetar, sum sjálvsagt eisini er ein tilvildarlig leiting, men hon gav ábending um fólk við viðkomandi útbúgving/starvi. Í fjórða lagi, og mest gevandi, var talan um at spyrja okkum fyri hjá stovnum og fólki, sum vit vistu, høvdu kunnleika til fólk við viðkomandi útbúgving/starvi.

Við støði í nevndu keldum, hava vit havt viðtal við 15 fólk, og eru teirra upplýsingar høvuðskeldan til viðgerðina í hesi frágreiðingini. Eitt viðtal skal í hesum samanhangi síggjast sum eitt amboð, hvørs høvuðsendamál er at finna fram til, hvussu ávísir persónar uppliva ávís evni (tema) (Buciek 1996:27ff). Í hesum føri, er temað útbúgving, flyting og fiskivinna, og hvussu ávísir persónar/respondentar (tey við hægri útbúgving)

uppliva sína støðu í mun til hetta tema. Uppgávan hjá tí, ið hevur viðtalið, er at fáa útgreinað svarini, fylgja teimum upp og tryggja at øll evnini verða viðgjørd til lítar, sum dentur er á (sokallað semi-strukturerað viðtal). Endamálið er at søkja inn í "lívsverðina" hjá tí sum spurdur verður, og á hesum grundarlagi tulka tær hugsanir, hesi fólkini hava um eitt ávíst fyribrigdi (t.d. at flyta til Føroya), herundir meiningarnar í teimum fyribrigdum, sum vera lýst (Hovgaard 2001a). Í stuttum er uppgávan síðani, at transformera talu til tekst, sum so aftur er grundarlag fyri greining, og á tann hátt svara høvuðsspurninginum.

Umframt nevndu viðtalsdata, brúka vit viðkomandi data, sum vit hava fingið gjøgnum aðrar datainnsavningar innan Rekrutteringsverkætlanina. Eitt nú hava vit ringt runt til øll virki innan fiskivinnuna á landi í sambandi við við arbeiði okkara at lýsa bygnaðin í vinnuni. Í triðja lagi nýta vit nýggjar útlendskar kanningar og royndir, sum viðgera líknandi spurningar (t.d. Jamtøy 2002; Holmen 2002).

*Viðtalsmannagongd*

Frammanundan fyrsta viðtal, varð gjørd ein sokallað viðtals-leiðbeining(interview-guide), og hevur hon verið gjøgnumgangandi leiðbeiningin til hvørt viðtal (sí fylgiskjal 1). Leiðbeiningin er bygd upp í 6 partar, sum vit frammanundan tulkaðu at hava serligan týdning fyri tann einstaka og hansara val av útbúgving, vinnuval og herundir val/frával av fiskivinnu sum karrierumøguleika.

Vanliga mannagongdin hevur verið, at persónarnir eru kontaktaðir nakrar dagar frammanundan ætlaða viðtalið. Viðkomandi hevur fingið at vita endamálið, og hví hann/hon er vald út. Øll tey spurdu hava játtað at luttikið, og vanliga hava vit møtt viðkomandi á einum staði, tey hava valt, soleiðis at tað hevur passað teimum best. Av praktiskum fíggjarligum orsøkum var ikki gjørligt at hitta øll persónliga, og eru einstakar samrøður tí gjørdar gjøgnum telefonina.

*Data-greining*

Dataviðgerðin er farin fram eftir sokallaðum "dekoding-teknikki" (Neumann 421ff; Hovgaard 2001a), hvørs endamál er induktivt at skipa kvalitativ data, og á hendan hátt gera algilding møguliga. Klassiska grundarlagið fyri hesum slagi av kvalitativari gransking finst í sonevndu Grounded-Theory tilgongdini (Glaser & Strauss 1967; Strauss & Corbin, 1990). Í hesum arbeiði hava vit ikki strembað eftir at fremja nakra teoretiska algilding, men lagt dentin á empirisku lýsingarnar, og kemur hetta sjálvsagt eisini fram í sjálvum tekstinum.

## 3. Lýsing av respondentum

Í hesum partinum av frágreiðingini, fara vit nærri inn í eina lýsing av respondentunum, t.v.s. greina nærri: 1) teirra bakgrund 2) hví tey valdu ta útbúgving, tey nú einaferð hava valt, og 3) hvørjar orsøkir tey hava fyri at flyta / ikki-flyta aftur til Føroya. Á hesum grundarlagi kunnu vit nærkast einum svari uppá, hvat fiskivinnan hevur at siga fyri tey høgt útbúnu, ið starvast uttanlands, og hvørt eitt starv í vinnuni hevði verið áhugavert fyri tey. Spurningarnir verða viðgjørdir í hvør sínum broti niðanfyri.

### *3.1. Hvørja bakgrund hava respondentarnir?*

Felags eyðkenni fyri allar svarpersónar er, at tey eru født og uppvaksin í Føroyum. Tey hava øll livað tey flestu av sínum barnaárum her, og eru á ungum árum farin uttanlands at nema sær eina hægri útbúgving. 11 av svarpersónunum búgva framvegis uttanlands, meðan 4 teirra nú eru búsitandi í Føroyum. Allir respondentarnir eru antin lidnir við útbúgving sína, ella komnir væl áleiðis við eina hægri útbúgving.

8 menn og 7 kvinnur eru spurd, harav 7 eru vaksin upp í høvuðsstaðarøkinum og 8 á bygd. 3 av teimum hava foreldur, har annað frammanundan hevur hægri útbúgving, meðan tey flestu hava foreldur við antin miðalútbúgving (oftast pápin) ella ongari útbúgving (oftast mamman).

Øll tey spurdu hava eina útbúgving við antin beinleiðis (t.d. fiskivinnufrøðingur) ella óbeinleiðis (t.d. verkfrøðingur) tilknýti til fiskivinnuna. Hesi kunnu eisini býtast upp í

tveir bólkar: 1) tey við útbúgving/starvi í fiskivinnuni, og 2) tey, ið antin beinleiðis ella óbeinleiðis velja fiskivinnuna frá.

## 3.2. Hví hava tey valt ta útbúgving, tey hava?

Tá fólk vera spurd um grundgevingar fyri teirra vali av útbúgving, eru frágreiðingarnar oftast ein blandingur millum okkurt eitt sindur ógreitt – tó knýtt at ávísum fyribrigdum/hendingum - í fortíðini, og so onkra heilt ávísa hending í skúlatíðini (serliga miðnám), sum gjørdi, at endaliga valið varð tikið[3].

Flestu respondentarnir tóku støðu til sína útbúgving í seinasta árinum á miðnámsskúla ella stutt hareftir. Partvíst er talan um persónligar frágreiðingar, t.d. at "nú má man blíva til nakað" ella eitt forvitni um onkur fyribrigdi, t.d. í náttúruni. Onkursvegna vistu tey, um valið skuldi vera "náttúra" ella "samfelag", men hvat innan fyri hesar rammur, má sigast hava verið heldur tilvildarligt. Tey peika ofta á ein ávísan persón (lærara), sum fekk tey at siga: "hetta er tað, eg vil". Og í serligan mun gjørdi hetta seg galdandi fyri tey, ið hava valt eina útbúgving beinleiðis knýtta at fiskivinnuni[4]. Valið hjá teimum gjørdist lætt, partvíst tí lærarin var ein eldhugaður persónur, partvíst tí viðkomandi lærari gjørdi nógv burtur úr praktiskum royndum í sínari undirvísing[5]. Hetta vísir, at tað er neyðugt við einum virknum arbeiði í skúlunum, til tess at gera fiskivinnuna eitt val millum onnur spennandi starvsøki at virka innanfyri. Allir respondentar løgdu stóran dent á, at tey fingu sera lítla vitan um fiskivinnu í teirra skúlatíð, og serliga saknaðu tey at samantvinna ástøðiliga undirvísing við tann praktiska gerandisdagin betri, serliga í fólkaskúlanum[6].

Teir respondentar, sum hava valt beinleiðis fiskivinnuútbúgving, seta ikki hetta valið í samband við teirra bakgrund á bygd, ella at tey koma frá einum fiskivinnuumhvørvi. Tey skilja greitt millum fiskivinnu sum "siðvenja" (at vera fiskimaður t.d.) og

---

[3] Bara ein respondentur svaraði, at tann útbúgvingin, hann tók, var tann, hann altíð hevði ætlað sær.

[4] Áhugavert er, at okkurt læraranavn gekk aftur, sum megnaði at gera fisk og fiskivinnu til nakað spennandi, og tí gav íblástur til víðari útbúgvingina.

[5] Ein respondentur sigur t.d., at tey við læraranum vóru úti við báti og fiskaðu, tey gjørdi royndir av fiski, tey gjørdi smáar stovnsmetingar, og fingu soleiðis kombinerað teori og praksis á ein viðkomandi hátt..

[6] Ein respondentur peikaði m.a. á, at tá ein lærarari (vikarur) í fólkaskúlanum tók tey við at fiska, og tey síðani kruvdu, høvdu innvølir o.a. undir sjóneyku, var hetta greitt við til at vekja áhugan fyri tí faki, hann valdi.

fiskivinnu sum eitt "modernað" starv (t.v.s. at arbeiða við fiskivinnu fyrst og fremst við støði í teoretiskari vitan). Hinvegin peika tey á, at mong í teirra heimliga umhvørvi undrast á, at tey brúka nógv ár av teirra lívi at læra um fisk, og – ikki minst - at tey tíma at brúka sína tíð upp á fisk. Frágreiðingin er tann, at tað er ikki fiskur sum so (ella sum siðvenja), ið er áhugavert. Tað er fiskur sum lívfrøðiligt, evnafrøðiligt, ella samfelagsligt fyribrigdi, ið er spennandi. Í prinsippinum kundi valið tað sama verið seyður, neyt ella hønur, men at valið er gjørt, tí tey onkursvegna lærdu, at tað var eitt spennandi starvsøki, sum eisini víst er á frammanfyri.

Tey flestu – eisini tey av bygd – hildu seg ikki vera uppvaksin í einum fiskivinnuumhvørvi, heldur ikki um teirra nærmastu høvdu starv í vinnuni, og tey sjálvi kanska høvdu roynt at egnt ella arbeitt á fiskavirki. Hetta kann helst lýsast við, at skúlagongd og nútímans tilvera á bygd og bý, ber við sær so nógv annað virksemi enn fiskivinnu. Hetta sæst aftur í, at tað vóru tey eldru av respondentunum, sum meira hildu seg vera uppvaksin í einum fiskivinnuumhvørvi.

Spurningurin er so, um teirra mentanarliga og persónliga bakgrund ongan týdning hevði fyri valið av útbúgving, herundir valið av einum beinleiðis fiskivinnufaki. Svarið er tó eitt greitt ja[7]. Tað felags eyðkennið, ið allir respondentar samsvarandi løgdu til grund fyri val av útbúgving var, at hon var nakað, tey kundu brúka í Føroyum. Tankin um at flyta heimaftur er nakað, tey sostatt taka við sær frá fyrsta degi undir hægri lestri. Hetta er kanska ikki so løgið, tá hugsað verður um, at tey flestu uttan iva flyta til fremmant stað úr onkrum, tey kenna sum eitt trygt umhvørvi. Men hesin hugburður speglast eisini undir lestrinum. Nøkur svaraðu til dømis, at tá teirra grundútbúgving var liðug, so valdu tey eitt nú linju um fisk/fiskivinnu, tí hetta hevði týdning fyri Føroyar og teirra persónligu møguleikar heima. Harumframt hava tey, sum hava verið fleiri ár á einum útlendskum arbeiðsmarknaði, framvegis eina ætlan um at flyta til Føroya. Hetta ger samstundis spurningin um, hví tey so verða 'hangandi' og ikki flyta heim, so mikið meira viðkomandi.

---

[7] Bara ein respondentur sá tradisjonella fiskivinnu við einum negativum hugburði, meðan hini greitt høvdu ein positivan hugburð um vinnuna, tað var bara ikki soleiðis at tey sjálvi ynsktu at arbeiða í/við vinnuni í síni tradisjonellu merking.

## 3.3. Flyta heim ella ikki?

Spurningurin um at flyta heim ella ikki, er sjálvandi tengdur at eini røð av lívsstøðum, sum eru knýttar at lestrarlívinum: man fær ein partnara, børn, eitt nýtt og dámligt umhvørvi, nýggj sambond o.a. So longri tíð ein er burtur úr Føroyum, jú meira rótfestur verður man helst í tí umhvørvinum, ein flytur til. Ella verður man tað? Eitt væl umboðandi svar upp á spurningin um flyting ella ikki, var:

> "*ja, man er jú á veg alla tíðina, men nær ... Tað er ikki í morgin, men kann verða nokk so skjótt.*"

Hóast fleiri av okkara respondentum hava búð væl meira enn 5 ár uttanlands, er ongin ivi um, at tankin um at flyta heimaftur alla tíðina er har. Men sum sitatið týðuliga ber boð um, er talan um eina rættuliga tvítýdda støðu, har spurningurin er, hvør tann "útloysandi" faktorurin til "røttu løtuna" er, at velja flytingina.

Ein orsøk til fasthaldandi hugburðin at flyta heimaftur, liggur greitt í, at tilknýtið til familjuna heima í Føroyum verður varðveittur. Men tað tykist ikki, sum gamla netið "har heima", er tað, ið setur flytingina í gongd. Familjuna og heimstaðin kann tú í dagsins samfelagi røkja rímuliga væl, hóast tú býr uttanlands. Samstundis er tað so, at ein við nógvum árum uttanlands verður "øðrvísi" enn tey har heima, og tí er tað ikki altíð eitt einvíst positivt val at flyta aftur.

Lægra lønarlagið í Føroyum tykist ikki at vera ein beinleiðis forðing fyri at flyta. Bara ein av øllum respondentunum, legði týðandi dent á lønina, sum part av valinum at flyta heim. Og hóast vánalig bústaðarviðurskifti og vantandi barnaansing taldi skeiva vegin, so er heldur ikki her talan um eina avgerandi forðing at gera royndina.

Avgerandi faktorurin fyri valið hjá teimum høgt útbúnu at flyta heim ella ikki liggur í innihaldinum í tí starvi, ein fær boðið. Við hetta meinast: 1) at arbeiðsuppgávan samsvarar nøkulunda við tær ambisjónir, viðkomandi hevur, 2) at møguleikar eru fyri persónligari fakligari menning, og 3) at møguleiki er at taka sjálvstøðugar avgerðir viðvíkjandi egnum arbeiðsuppgávum. Hendan møguleikan síggja tey greitt verri, enn í

einum starvi uttanlands. Ein má tí rokna við at "fara uppá kompromis við sína fakligheit", sum tikið varð til av onkrum. Við hetta meinast, at tey ikki kunnu arbeiða so spesialiserað og fakliga málrættað, sum t.d. á einum útlendskum universiteti ella menningarstaði. Tað áhugaverda er, at hetta samstundis er eitt kompromis, tey hava viljan at gera. Hetta tí, at Føroyar upp á nógvar mátar verður sæð sum eitt fakligt "experimentarium", og møguleikarnir fyri nýggjum spennandi avbjóðingum eru so nógvir. Vantandi "spesialiseringin" kann sostatt vigast upp við eini "breiddarspesialisering", har man varðveitir møguleikan fyri fakligari og persónligari menning.

Stóri trupulleikin kann best sigast vera, at vinnulív og tað almenna í Føroyum ikki (ella í ov lítlan mun) arbeiðir á ein hátt, sum tey læra at arbeiða á einum universiteti, t.v.s. við málrættaðum granskingar- og menningarætlanum (G&M), bygt á teoretiska vitan. Serliga av hesi orsøk liggur tað arbeiðið, tey veruliga kundu hugsað sær, ikki beinleiðis fyri. So gott sum allir respondentarnir høvdu frálík hugskot til størv / arbeiðsøki tey kundu hugsað sær, sum antin ikki funnust ella vóru tengd at alt ov tungum mannagongdum. Her liggur tann næsti avgerandi trupulleikin, tí serliga hugburðurin til, hvussu "tað almenna" virkaði, var heldur negativur, tó at tey sum so ikki gjørdu tann stóra skilnaðin millum, hvørt arbeiðið, tey fingu, var innan almenna ella privata sektorin[8].

Um tey við hægri útbúgving taka stigið til flyting ella ikki, er fyrst av øllum ein spurningur, um tað arbeiðið, tey fáa bjóðað, sum lýst omanfyri. Men hóast arbeiðið er har, er talan um eina rættuliga tvítýdda støðu. Í nakað broyttum líki, lýsir eitt av teimum meira kontantu svarunum - ávirkað av politiska kjakinum júst tá - støðuna hjá mongum rættuliga væl:

> *Tað mest tiltrekkjandi við Føroyum er, at tað er eitt slaraffenland í mun til ta útbúgving/arbeiði eg havi … Tá eg var í Føroyum í summar, tá ivaðist eg,*

---

[8] Hóast onkur helt tað vera spennandi og avbjóðandi, so høvdu tey ikki ov góðan hug til, sjálvi at byrja eitt virki. Ikki tí, tey kundu gott "sett pengar í" v.m., men tey fryktaðu, at teirra tíð tá fór til at umsita heldur enn at útvikla.

*men so eftir at eg kom niður aftur, varð eg 'lektur' aftur. Síðani er so nógv komið afturat sum ger, at eg als ikki kundi hugsað mær at flutt heim. Religiøsa fanatisman og idiotiin er ein avgerandi faktorur. Jagstranin av teimum samkyndu er partur av hesum. Eitt annað er tann stóri inkonsekvensurin, sum er í allari tí almennu skipanini. Eg orki ikki hetta, tú fært ikki arbeitt seriøst, tá sovorðið kemur ov tætt upp á ein.*

Ein annar persónur sigur stutt og greitt, at *"jú longri eg eri vekk, jú minni hastar tað"*, men setir aftur hetta í samband við, hvussu tey persónligu viðurskiftini eru við "tað har heima". Hesa tvístøðu, og teir ítøkiligu trupulleikarnar við at taka av starvi í Føroyum, skulu vit venda aftur til í parti 4.

## *3.4. Samanumtøka*

Við støði í lýsingunum frammanfyri, kunnu vit nú gera okkum eina ábending um, hvat fiskivinnan hevur at siga fyri tey høgt útbúnu fólkini uttanlands, og hvørt eitt starv í føroysku fiskivinnuni hevði verið áhugavert fyri tey ella ikki.

Tað fyrsta, vit kunnu sanna, er, at fiskivinna fyri ein høgt útbúnan persón er tvey ting. Partvíst er tað nakað, sum hevur samband við teirra barndóm og uppvøkstur, og her telja fyribrigdi sum útróður, trol og flakavirki nógv. Flestu teirra hava eisini roynt hendan partin av fiskivinnuni, og tey hava flestøll eisini ein positivan hugburð til hendan partin av vinnuni. Hinvegin hevur hetta onki beinleiðis við teirra val av útbúgving og lívsleið at gera, hvørki hjá teimum, sum hava valt fak við beinleiðis tilknýti til vinnuna ella ikki. Valið av útbúgving er tikið við støði í nøkrum heilt konkretum fyribrigdum, har "onkur" ella "okkurt" hevur sannført tey um, at júst hatta er tað, tey vilja. Valið av fiskivinnufaki er t.d. beinleiðis knýtt at persónum, sum gjøgnum undirvísing ella annað slag av kunning, hevur givið teimum eina greiða ábending um, at hetta er nakað spennandi at útbúgva seg til. Tó høvdu tey eina fatan av, hvørt tey vildu velja "samfelag" ella "náttúru".

Føroyar og tað at flyta heimaftur stendur teimum sera nær í huganum, men tað eru nógv ymisk viðurskifti, sum telja skeivan vegin. Stóri fyrimunurin tykist vera, at Føroyar eru

eitt ”eldorado” fyri fólk við høgum útbúgvingum, og kunnu tey sameina eitt tílíkt sjálvmennandi starv við onnur virði, tey seta høgt, so er gáttin at fara uppum ikki so høg. Livir starvið upp til hesi krøv um fakliga og persónliga menning, so er starv í fiskivinnuni eins áhugavert og eitthvørt annað starv. Tó skal verða mint á, at ofta eru tað tvey fólk, ið skulu hava nýtt starv, tá flyting kemur upp á tal (t.v.s. tá talan er um pør), har bæði krevja eitt persónliga mennandi starv.

Samanumtikið vísir hetta, at tað er avgerandi neyðugt við einum virknum rekrutteringsarbeiði, um ynskt verður, at fólk skulu taka tær hægri útbúgvingar ella tey hægri størv, ið hava týdning fyri framtíðina hjá fiskivinnuni. Spurningurin er tó framvegis, hvussu vit koma nærri eini frágreiðing, hvar og hvussu setast skal inn. Hetta verður viðgjørt nærri í komandi partinum.

## 4. Hvat við fiskivinnuni?

Í parti 3 var greitt, at allir okkara respondentar høvdu eina ætlan um at flyta aftur til Føroya, men at rætta løtan ikki var komin. Tey, sum vóru flutt heim, gjørdu hetta fyrst av øllum, tí tey høvdu eitt avbjóðandi og viðkomandi arbeiði at fara til. Her vilja vit greina nærri, hvørjir fyrimunir og vansar liggja í valinum hjá teimum hægst útbúnu at flyta til Føroya og gera hetta við støði í teimum fýra kritisku faktorunum, vit komu fram til í parti 2. Hesir faktorar eru: 1) mentanarfaktorurin, 2) arbeiðsmarknaðarfaktorurin, 3) persóns- og tíðarfaktorurin og 4) politikk- og tænastufaktorurin.

### *4.1. Mentanarfaktorurin*

Mentanarfaktorurin er tann, sum partvíst hevur við eina langtan eftir tí, sum man er fluttur frá, at gera. Her tala vit um familjuna, náttúruna, bygdarlívið og vinabondini á tí staði ella støðum, har ein er vaksin upp og síðani fluttur frá. Men vit tala eisini um núverandi samtekstin, t.v.s. tann samleika, skaptur er á einum nýggjum staði, ikki minst gjøgnum sjálva útbúgvingina, sum er vald. Okkara niðurstøða er, at mentanarfaktorurin hevur týdning, men ikki avgerandi týdning, fyri valið av flyting aftur til Føroya, heldur ikki fyri at vera verandi í einum øðrum landi.

Mentanin hevur sjálvsagt nakað at siga fyri, at allir okkara respondentar gera sær greitt, at “tey ætla sær heimaftur”. Men út fra tí kann ikki úrleiðast, at tey eisini fara at flyta. Tey hava bæði eina greiða mynd av føroyska samfelagnum (ella teirra lokalsamfelagi), sum ein góður karmur um eitt familjulív, men eisini sum nakað “konservativt” og persónliga avmarkandi. Tað er serliga her, at tann tvístøða, vit lýstu í parti 3, kemur inn (serliga 3.3.).

Hetta sama speglast aftur í teirra hugburði til fiskivinnuna, sum fyri tey flestu umboðar tað arbeiðs- og lívsmynstur, tey sjálvi eru vaksin upp við. Tey síggja hetta lívið sum nakað serstakt mentanarliga og vinnuliga, men avgjørt ikki sum nakað, tey sjálvi vilja liva, hóast tað greitt er nakað, tey respektera. Tá tey sjálvi hugsa um fisk, so er tað ikki “tað ítøkiliga arbeiðið” á báti ella virki, men heldur “tað úrtøkiliga (abstrakta) arbeiðið” sum liggur í einum reagensglasi ella á einum tekni- og skriviborði.

Í mentanarfaktorinum er eisini tann størsti kynsligi munurin á svarunum. Tað eru ofta kvinnurnar, sum hava ein heldur negativan hugburð til at fara aftur til Føroya, og sum meta hetta fara at blíva eitt minni “kultursjokk”. Tað fríara sosiala lívið í einum stórbýarumhvørvi hevur nógv at siga, men tað fær tó minni týdning við árunum – bæði fyri kvinnur og menn –, t.v.s. tá man sjálvur verður meira “etableraður”.

Okkara niðurstøða er eisini, at mentanin á tí staðnum, ein flytur frá, ikki hevur tann avgerandi týdningin. Tey flestu eru flutt til eitt ávíst stað, tí tey hava søkt útbúgving ella arbeiði har, og tí hevur staðið sum so minni týdning. Um tey so flyta aftur til Føroya, er heldur tengt at einari ítøkiligari lívsstøðu, ella “av røttu løtuni”, og tá er spurningurin um dagliga at hava møguleikan at fara í Kongaligu Operuna, á Kafé ella í Tivoli ikki so avgerandi. Er ein komin í tann aldurin, at man hevur fingið familju, so hevur føroyska umhvørvið heldur ein fyrimun.

## *4.2. Arbeiðsmarknaðarfaktorurin*

Tá innihaldið í arbeiðinum hevur serliga avgerandi týdning fyri, hvørt flyting kemur upp á tal ella ikki hjá teimum hægst útbúnu, so er greitt, at arbeiðsmarknaðarfaktorurin hevur serligan týdning. Vit kunnu siga tað soleiðis, at tey allarflestu standa í eini

bíðistøðu, til "tað rætta" arbeiðið verður bjóðað út, og samsvarar tað nøkulunda við teirra lívs- og karrierustøðu beint tá, so taka tey møguleikan. Tey seta, sum ávíst í parti 3, nøkur ítøkilig krøv til innihaldið í arbeiðinum, og flestir respondentar høvdu eina greiða mynd av, hvat eitt tílíkt starv í fiskivinnuni kundi verið fyri júst tey.

Forðingin fyri flyting liggur stutt sagt í, at tað arbeiðið, tey kundu ynskt sær, heilt einfalt ikki finst, umframt ein ávísur ivi um støðuna á arbeiðsmarknaðinum. Við hesum meinast í roynd og veru trý viðurskifti:

1) At tað í so lítlan mun verður arbeitt "soleiðis sum tey læra á einum universiteti", sum eisini nevnt í parti 3. Við hesum meinast, at størvini knýtt at sokallaðum G&M-uppgávum (Granskingar- og Menningaruppgávum) eru fá, og hava lítlan týdning fyri føroyska arbeiðsmarknaðin, soleiðis hann nú er samansettur. Hetta speglast sjálvsagt mest aftur í einum iva hjá teimum hægst útbúnu.
2) At tey við at flyta, missa dagliga sambandið við eitt fakligt umhørvi uttanlands, sum tey samstundis vita ella halda, ikki er nóg sterkt í Føroyum. Hetta virkar greitt ræðandi fyri tey, tí tað er so týdningarmikið fyri teirra persónligu menning.
3) At dagliga arbeiðið eftir eina flyting, kemur at vera eyðkent av ov nógvari umsiting og rutinuarbeiði. At her veruliga er talan um ein trupulleika sæst aftur í, at tey, sum hava starvsroyndir úr Føroyum, júst peikaðu á rutinuarbeiði og umsitingarbyrðu sum ein avgerandi trupulleika.

Men sama tvístøða, ið áður er nevnd, sæst eisini aftur her. Fleiri respondentar gjørdu greitt, hóast teirra almenna fyrivarni, at tey vildu flyta aftur til Føroya, um tað so kostaði teimum dreymastarvið uttanlands. Fyrimunurin í tí føroyska umhvørvinum liggur, sum áður nevnt, í "teimum ótroyttu møguleikunum", ikki minst innan fiskivinnuna.

Hóast tey flestu ikki sóu teir stóru møguleikarnar innan fiskivinnuna, soleiðis sum støðan var "beint nú", so varð tó peikað á nakrar glottar fyri framman. Tey við beinleiðis fiskivinnuáhuga nevndu eitt nú Fiskirannsóknarstovuna, nakrar verkætlanir innan Fiskivinnuroyndir og Faroe Marine Biotech, sum spennandi og viðkomandi avbjóðingar, tey høvdu verið serliga áhugað í. Teir ótroyttu møguleikarnir gera, at tey høvdu farið "upp á kompromis" við teirra fak, um starvið beyðst, tí eitt tílíkt

'nýskapandi' starv hevði vigað upp móti tí møguliga tapi, tey annars høvdu havt (tætt fakligt net v.m). Í tílíkum førum, er lønin heldur ikki ein so avgerandi faktorur, sum eisini peikað á í parti 3[9].

Tað avgerandi fyri at fáa hesi fólk hendan vegin verður uttan iva, í hvønn mun tað ber til at menna tey viðurskifti, nevnd eru omanfyri, tí her liggur avbjóðingin at menna ein arbeiðsmarknað, sum livir upp til krøvini, ið tey hægst útbúnu seta.

## *4.3. Persóns- og tíðarfaktorurin*

Hóast iva um støðuna á føroyska arbeiðsmarknaðinum, so høvdu tey flestu vónina um at fáa tað "spennandi" arbeiðið, eisini tey, sum høvdu verið heilt longi burturi. Hóast ongin ivi er um, at jú longri ein verður burturi, truplari er at flyta til Føroya, so livir vónin alla tíðina at royna hetta, og møguleikin verður hildin opin.

Orsøkin til, at okkara respondentar av fyrstan tíð hava valt at verða verandi uttanlands er, at tey hava ynskt at menna sín persónliga førleika fyrst. Tey hava søkt ella fingið bjóðað eitt spennandi starv, og øll vóru á einum máli um, at arbeiði uttanlands var ein fyritreyt, áðrenn tey vildu flyta heimaftur. Tey ynsktu hetta, tí tey greitt síggja fakligar avmarkingar í Føroyum sum óroyndur kandidatur, og við at flyta beinanvegin er tað fyri tey, sum um "borðið fangar". Tey vita sjálvsagt, at tað ber til at flyta avstað aftur, men eisini, at hetta er lættari sagt enn gjørt.

Spurningurin er so, hvat ger, at tey hóast alt varðveita eitt tilknýti heimeftir. Svarið er, at hóast tú býr nógv ár uttanlands, so varðveitir tú sambondini heimeftir. Tá meinast ikki bara við familjuna og gamla sosiala umhvørvið, men í stóran mun við tað net av øðrum fakfólki, tey kenna frá lestrinum. Enntá kann sigast, at teirra fakliga net í Føroyum eisini er teirra sosiala net[10]. Hetta net ger, at tey halda seg kunnað um, hvat rørist í føroyska umhvørvinum, og ofta eru tey gjøgnum hetta net drigin inn í føroyska umhvørvið, t.d.

[9] Hetta er tó ikki tað sama sum at siga, at talan skal vera um láglønarstørv.
[10] Vit kunnu siga, at tað gamla sosiala netið, knýtt at heimstaðnum og teimum, ein er vaksin upp við, er skift út við tað sosiala netið, sum nú eisini virkar sum eitt fakligt net. Nærmasta familjan tó undantikin.

sum ráðgevar ella sum samstarvspartar í onkrari ávísari verkætlan. Í triðja lagi er her ein kelda til vitan um, hvørt tað er vert at royna flytingina ella ikki.

Niðurstøðan her er tann, at persónfaktorurin hevur rættuliga stóran týdning fyri rekruttering av fólki við hægri útbúgvingum. Men tað krevur, at tey fólkini, sum eru í Føroyum, hava "positivar" upplivingar at geva víðari, og so koma vit í stóran mun aftur inn á arbeiðsmarknaðarviðurskiftini.

## *4.4. Politikk- og tænastufaktorurin*

Sum nevnt í brotinum frammanundan, vóru okkara respondentar sera væl vitandi um, hvat rørir seg í Føroyum. Hetta ger sjálvandi eisini, at tey kenna til trupulleikar í Føroyum við at finna barnagarðspláss, at bústaðarprísirnir eru høgir og – sum onkur var inni á – at tey vóru ónøgd við, hvussu skúlin virkar. Hesi viðurskiftini kunnu sjálvsagt hava týdning fyri valið at flyta heim ella ikki, men hinvegin eru hetta trupulleikar, ið eru væl kendir í nógvum øðrum umhvørvum. Eisini kunnu nógvir av hesum trupulleikum í hvussu so er eina tíð - bøtast aftur við hjálp frá familjunetinum. Tí vilja vit ikki siga, at tænastufaktorurin hevur beinleiðis negativa ávirkan á spurningin um flyting, t.v.s. um tað rætta starvið knappliga stendur í boði.

Men viðurskiftini innan tænastusektorin vóru eisini tengd at eini vitan um eina politiska skipan, sum partvíst arbeiðir rættuliga stuttskygt, partvíst fyrikemur at vera óstøðug (oftani vóru hesi bæði viðurskifti nær tengd at hvørjum øðrum). Við hesum meinast m.a., at ein langtíðarpolitikkur var saknaður á teimum økjum, sum hesin málbólkurin er áhugaður í, t.v.s. innan G&M-økið. Hetta ger seg ikki minst galdandi innan fiskivinnuna, har tey flestu sum nevnt, sóu stórar ótroyttar møguleikar.

Aftur her er áhugavert, at var rætta arbeiðið har, so vildu tey gera royndina, og varð hetta ofta bygt á eina hugsan um, at tað bar til at ávirka og menna gongdina rætta vegin. Tí er politikkfaktorurin eisini nær tengdur at arbeiðsmarknaðarfaktorinum.

### *4.5. Hvat hevur týdning fyri rekruttering til fiskivinnuna – samanumtøka*

Tað er heilt greitt, út frá okkara arbeiði, at sjálvt innihaldið í starvinum, ein við hægri útbúgving fær bjóðað, er tann avgerandi faktorurin fyri, hvørt viðkomandi velur at flyta til Føroya ella ikki. Tí liggur avbjóðingin fyrst av øllum í, hvørt Føroyar megna at skapa ein arbeiðsmarknað fyri hesi fólkini, og skulu vit í næsta parti koma inn á nakrar ítøkiligar ávísingar til hetta (í hesum sambandi, serliga brot 5.3.)

Meira yvirskipað, so liggur ein alstór avbjóðing fyri eina framtíðar rekruttering til fiskivinnuna í spurninginum, hvussu tað er gjørligt at fáa tvær heilt ymiskar mentanir at møtast, t.v.s. ta "praktisku" mentanina í dagsins fiskivinnu og ta "teoretisku" mentanina í útbúgvingar- og granskingarverkinum. Hetta er nakað, vit longu kenna frá t.d. kjakinum um stovnsmetingar, men ger hetta seg greitt galdandi í flest øðrum samanhangum eisini. Er valið um flyting aftur til Føroya hjá viðkomandi málbólki tengt at nakrari beinleiðis mentan, so er tað júst eini fakligari mentan, t.v.s. ein spurningur, um man heldur seg hava ella kunna menna eitt fakligt umhvørvi í Føroyum. Tey hægst útbúnu eru tilvitað um, at tað verður talan um eitt eitt sindur øðrvísi slag av spesialisering enn tann, tey eru von við, men lúkar hetta nøkur grundkrøv um arbeiðsumstøður og persónliga menning, so taka tey møguleikan.

Tí er tað gjøgnum arbeiðsmarknaðar- og G&M-politikkin fyrst av øllum neyðugt at styrkja tey fakligu sambondini og "siðvenjurnar" í Føroyum, skal tað vera møguligt at fáa tey hægst útbúnu at venda sær móti fiskivinnuni. Hervið meinast fyrst av øllum at styrkja um samstarv og samskifti millum føroyska arbeiðsmarknaðar/G&M-politikkin og málbólkin: tey hægst útbúnu. At fáa meira ferð á hesa gongdina við beinleiðis rekrutteringsarbeiði, er útgangstøðið í næsta parti.

## 5. Rekruttering av høgt útbúnum til fiskivinnuna - Tilmæli

Í hesum partinum skulu vit geva nakrar ítøkiligar leiðbeiningar til, hvar og hvussu setast skal inn, fyri at styrkja rekrutteringina av høgt útbúnari arbeiðsmegi til føroysku fiskivinnuna. Tilmælini byggja fyrst av øllum á tær royndirnar, vit hava gjørt okkum við teimum viðtalum, ið hava verið grundarlag undir hesi kanningini. Hóast vit hava havt

samrøður við fólk, sum eru liðug ella komin væl áleiðis í útbúgvingarskipanini, so er greitt, at rekrutteringsarbeiðið til fiskivinnuna byrjar langt fyri hesa tíðina. Hesi fólkini hava eisini givið nógvan innblástur til, hvussu setast kann inn langt frammanundan, og vilja vit býta rekrutteringsátøkini upp soleiðis, at tey røkka trimum ymiskum bólkum av fólki: 1) tey, ið fara undir hægri lestur, 2) tey, ið eru undir hægri útbúgving, og 3) tey, ið hava hægri útbúgving, men hava valt at starvast uttanlands.

Tað er ongin ivi um, at skal áhugin fyri fiskivinnuni styrkjast, so er tað ikki minst í undirvísingini í fólkaskúlanum setast skal inn, nakað sum nógvir av okkara respondentum eisini peikaðu á. Tað liggur tó uttan fyri endamálið her, at viðgera tann spurningin, men verður hann greinaður nærri í øðrum arbeiði innan Rekrutteringsverkætlanina.

## *5.1. Tey, ið fara undir hægri lestur*

Útgangsstøðið her er eitt ynski um, at fleiri nærmingar á miðnámsstøði velja sær útbúgvingar, ið antin hava týdning fyri fiskivinnuna ella beinleiðis eru knýttar at fiskivinnuni. At røkka einum tílíkum endamáli krevur, at aktivt verður sett inn í miðnámsskúlanum, og við hesum meinast tvey ting.

Í fyrsta lagi meinast, at eitt størri arbeiði verður gjørt at vísa á teir møguleikar, sum finnast við hægri lestri knýttum at fiskivinnuni. Tað eru hesir konkretu upplýsingar, sum fáa fólk áhugað í at læra fak, sum hava týdning fyri fiskivinnuna, og tey velja hesi fak, tí tey síggja ein greiðan møguleika fyri at "kunna brúka hetta aftur í Føroyum". Hetta kann vera nakað so einfalt, sum:

a) Gerð av faldarum við viðkomandi upplýsingum um lestarstøð, um innihaldið í útbúgvingunum, um møguleikarnar við útbúgvingunum v.m.
b) at skúlanæmingar hava eitt stað at venda sær til at fáa tílíkar upplýsingar, sum eru nevndar í a), og
c) at vera úti um seg úti á skúlunum, við at lata fólk, sum hava roynt hesar útbúgvingar, greiða frá teimum.

Leggjast skal í geyma, at her er talan um málbólk, sum meira ella minni hevur avgjørt at fara uttanlands at lesa á hægri læristovni, og sum helst frammanundan vita, antin valið fellur á fak innan "samfelag" ella "náttúru". Tala vit um rekruttering í einum breiðari týdningi, sum liggur uttan fyri endamálið í hesi frágreiðingini, skal nakað heilt annað til.

Í øðrum lagi meinast, at tað meira miðvíst verður gjørt eitt arbeiði á miðnámsskúlunum at samansjóða fisk og fiskivinnu inn í fak sum samfelagsfak, søgu, biologi og kemi. Hetta hevði givið næmingunum eina betri hylling av, hvat tað merkir at arbeiða við fiskivinnuni, "soleiðis sum man ger á einum universiteti". Fiskivinna kann veljast sum fak á summum miðnámsútbúgvingum, men hevur ikki stórvegis undirtøku. Ein orsøk til hetta er uttan iva grundað á hugburð til fiskivinnu sum so, men ein onnur orsøk er, at fakið ikki er førleikagevandi, t.v.s. er ikki beinleiðis krav fyri at koma inn á ein hægri lærustovn. Valið av fiskivinnu verður tí eitt slag av 'ífyllu' til at fáa fult tímatal, soleiðis sum eisini onnur fak eru tað. Stig til at fáa fisk- og fiskivinnu inn í breiðari undirvísingargreinar krevja neyva tilrættalegging, sum vit heldur ikki hava møguleika at fara inn á her.

## 5.2. Tey, ið lesa uttanlands

Tey, ið eru undir hægri útbúgving uttanlands, hava í stóran mun ætlanir um at flyta heimaftur til Føroya. Men hesir møguleikar verða greitt vigaðir móti møguleikunum uttanlands, og jú longur ein hevur verið burturi, jú lættari er at verða verandi. Avgerandi fyri flyting er sum sagt tað starvið, ein hevur at koma aftur til, og er viðkomandi marknaður vánaligur í t.d. Danmark, er valið at flyta til Føroya tað lættari. Hetta er tengt at nøkrum konjukturum, vit ikki heilt hava stýr á, men alment sæð eru eitt nú norðurlendsku og europeisku arbeiðsmarknaðirnir áhugaverdir fyri hendan bólkin av fólki, umframt USA. Her vilja vit leggja dentin á nøkur viðurskifti millum unversitets- og arbeiðsmarknaðarskipanina, sum hevur avgerandi týdning fyri rekruttering av teimum hægst útbúnu.

Eitt tað týdningarmesta við hesum viðurskiftum er, at tað gerst eisini alt meira vanligt at hava viðkomandi starv undir sjálvum lestrinum, m.a. tí at arbeiðs- og praktikkpláss gerast vanligur partur av útbúgvingarskipanini. Gjøgnum hesi praktikk- og arbeiðspláss

læra tey lesandi kanningar- og útgreiningararbeiði í praksis, og er hetta sjálvsagt við til at mynda teirra útbúgving og teirra val av starvi aftaná. Tey bestu verða tá "headhuntað" rættuliga tíðliga í teirra starvsleið, og áhugin kann tí lættliga fella enn meira móti einum øðrum arbeiðsmarknaði enn tí føroyska. Fleiri av okkara respondentum hava roynt viðkomandi starv í lestrartíðini, og tey søgdu greitt, at tað ávirkaði teirra val av starvi aftaná. Onkur teirra hevði slíkar upplivingar við at vera knýtt at føroyskum umhvørvi, men tað var samstundis nakað, ið saknur var í. T.d. varð nevnt, at tað, at summir stovnar settu 'ferðina' niður í summartíðarskeiðnum, fyri at spara, gjørdi, at møguleikarnir hjá teimum lesandi at hava eitt tilknýti til føroyskt umhvørvi minkaði samsvarandi.

Okkara niðurstøða er tann, at nevndu broytingar í sambandinum millum arbeiðsmarknaðar- og universitetsskipanina uttanlands, fer at herða kappingina um hægst útbúnu arbeiðsmegina framyvir. Fyri føroyska samfelagið, er aftur her talan um at skapa ein áhuga fyri tí føroyska arbeiðsmarknaðinum og teir møguleikar, ið har eru. Nøkur ítøkilig uppskot eru:

1) Ein skipan, vit kenna, er, at vinnan og tað almenna hava ein "uppgávubanka", har lesandi átaka sær at gera ávísar verkætlanir, sum hava týdning fyri framtíðina hjá fiskivinnuni, men samstundis er partur av teirra lesnaði. Hetta merkir, at tey lesandi kunnu koma í samband við vinnuna á ein viðkomandi hátt, og samstundis hevði hetta økt fatanina fyri teimum ymisku mátunum, arbeitt verður uppá í vinnuni/tí almenna og so á einum hægri lærustovni. Ein tílík skipan finst í samstarvi millum Vinnuhúsið og MFS[11], men liggur hetta átak í veruleikanum stilt, og verður ikki røkt. Vit halda, at tað er vert at endurskoða hesa skipan, eitt nú tí tey í Noregi hava góðar royndir av hesum (sí www.fiskerifond.no). Tað er eitt nú neyðugt, at talan er um okkurt slag av "gularótaskipan", har tey lesandi fáa okkurt afturfyri at gera ávísa uppgávu, t.d. flogferð, samsýning, stipendum ella líknandi. Eisini eigur skipanin at vera lagað soleiðis, at talan er/kann vera um avtalu millum t.d. eitt virki/felag og tann/tey lesandi um hvat endamálið er. Skipanin eigur at virka fyri tey, sum eru komin til serritgerðastøði í teirra lestri.

[11] Meginfelag Føroyska Studenta.

2) Skipað verður fyri møguleikanum at lata lesandi hava "praktikkpláss" innan føroysku fiskivinnuna, ella innan almennu skipanina, herundir útbúgving og gransking. Fyrimunirnir eru teir somu sum í fyrra uppskotinum, har munurin serliga er tann, at her kemur tann lesandi at verða partur av dagligu gongdini á einum arbeiðsplássi og tí eisini fær eitt slag av "binding" til virkið/stovnin. Eisini eigur møgueleikin fyri (partvísari) løn at vera umhugsaður sum partur av hesum.
3) Ein skipan, har lesandi í nógv størri mun vera knýtt at núverandi G&M-skipanini í Føroyum eigur at umhugsast, m.a. við at tryggja einum ávísum tali av lesandi "skrivstovupláss", t.d. meðan tey eru í Føroyum og gera sítt kanningararbeiði til serritgerðir o.a. Eisini í hesum førinum kann talan vera um onkra stipendiumskipan.
4) Eisini er møguligt at hava smáar "gularótaskipanir", har t.d. virðisslønir verða latnar fyri serliga væl gjøgnumførdar uppgávur og/ella nýskapanir. Harumframt átti at verið ein størri viðurkenning av, at fólk royna at vinna sær Ph.D-støði innan teirra øki, t.v.s. at løna teimum hareftir og onkursvegna eisini at knýta fleiri tílíkar verkætlanir at vinnum/stovnum her á landi.

## *5.3. Tey, ið starvast uttanlands*

Tey, sum hava verið uttanlands longst, hava gjørt hetta, antin tí tey blivu hugtikin av tí arbeiði, tey fingu bjóðað har, og tí tey beinleiðis ynsktu at fáa starvsroyndir og sostatt blíva betri kvalifiserað. Nú eru tey vaksin enn meira inn í eitt annað umhvørvi, har tey eru væl "etablerað", bæði við familju og á einum spesialiseraðum arbeiðsmarknaði innan tað, vit kalla G&M. Skulu tey tá finna leiðina til Føroya, krevur hetta, at tey fáa eitt starv, sum: 1) er spesialiserað og málrættað, 2) hevur ein ávísan tryggleika í sær, t.v.s. at talan má vera um starvsetan yvir longri tíð, og 3) at møguleikarnir fyri persónligari fakligari menning eru til staðar. Harumframt má hugsast um, at tað ofta eru tvey størv, ið skulu fást til vega. Tað er hesin veruleikin, ið er grundarlag undir viðgerðini í hesin brotinum.

Greitt er, at um vinnan hevur átrokandi brúk fyri fólki við hægri útbúgving, so verða tey helst eisini sett. Hinvegin eru nógvar uppgávur, sum røkka út um primeru uppgávurnar

hjá einum einstøkum virki, men sum tað ikki megnar av sínum eintingum, ella stórur ivi er um virðið av. Aðrir partar av okkara arbeiði innan rekrutteringsverkætlanina vísa t.d., at partar av vinnuni kundu hugsað sær at sett fólk við høgum útbúgvingum, serliga til at loysa tekniskar trupulleikar í framleiðsluni. Hetta er í sær sjálvum áhugavert, men ikki nóg mikið til at broyta vinnuna grundleggjandi viðvíkjandi brúki av G&M-størvum. Hartil eru uppgávur, ið ein vinnugrein ella –bólkur saman kundu fingið nyttu av, umframt uppgávur, sum í veruleikanum fyrst mennast, tá ið eitt virkið samband er skapt millum vinnu og tey fólkini, sum arbeiða við G&M. Eitt dømi, sum vit fyrr hava verið inni á, er tann hópurin av hugskotum til verkætlanir innan fiskivinnuna, nevnd vóru í sambandi við okkara viðtalur.

Greitt er, at ein størri og betri skipað almenn G&M skipan hevði hjálpt nógv upp á hesi viðurskiftini og fingið fólk við hægstu útbúgvingum og drúgvum starvsroyndum hendanvegin[12]. Hugurin er har, men fólk halda seg aftur, tí tey halda almennu skipanina vera ótrygga og stirvna, og loysnin á hesum liggur tí á einum politiskum støði, soleiðis sum lýst í parti 4.

Í øðrum lagi er eisini í hesum førinum talan um ein tørv á *samskifti* millum vinnu, tað almenna og tey fólkini, sum man gjarna vil hava fatur á. Tað er kent aðrastaðni frá, at vinna og "akademikarar" tosa hvør sítt mál, og í veruleikanum kenna ov lítið til hvønn annan, og hvørja nyttu gevast kann hvør øðrum. Tað eru m.a. slíkir tankar, sum liggja aftan fyri sonevndu "Ísbrótaraskipanina", ið vit kenna úr Danmark, og sum í tíðarskeiðnum 1994-96 fekk nógv fólk við hægri útbúgving inn í smáu og miðalstóru fyritøkurnar. Fleiri partar á danska arbeiðsmarknaðinum ynskja nú hesa skipanina uppafturtikna (Reeh og Bøttcher 2003a+b).

Skulu vit koma við einum ítøkiligum uppskoti, sum átti at verið møguligt innan núverandi fíggjarkarmar og eisini hevði givið nakrar royndir at bygt víðari á, so hevði tað verið at farið í gongd við eina føroyska "ísbrótaraskipan". Hendan skipanin skal taka serligt atlit at einum ítøkiligum tørvi, ið føroyska fiskivinnan hevur, og harumframt til tey serligu viðurskifti, vit hava lýst, gera seg galdandi at fáa fólk við hægri útbúgving

[12] Hetta vísir m.a. áhugin fyri arbeiðinum, ið nú fer fram í Fiskivinnuroyndum og aðrastaðni.

inn í vinnuna. Tí er serliga neyðugt at hava ein liðiliga skipan, har nógv tíð verður nýtt til samskifti millum persón(ar), avvarðandi virki/stovn(ar) og so tann partin, ið kemur at umsita/fíggja eina tilíka skipan.

### *5.4. Endi*

Tey, uppskot vit í hesum partinum eru komin fram til, viðvíkja í stóran mun upplýsing, samskipan og samskifti. Her er m.a. talan um ein tørv á breiðari upplýsing, sum t.d. til miðnámsskúlanæmingar um møguleikarnar við útbúgvingum innan fiskivinnuna. Eisini er talan um meira beinleiðis royndir at "headhunta" fólk við servitan, t.d. onkran við áralongum royndum í starvi uttanlands. Hesi uppskot skulu vit ikki endurtaka her, men avgerandi er at peika á, at tilík rekruttering til fiskivinnuna – ikki minst av teimum hægst útbúnu – krevur eitt miðvíst og samskipað arbeiði, fyri at fáa munagott úrslit. Nøkur átøk kunnu roynast upp á stutta tíð (t.d. ísbrótaraskipan), meðan onnur fyrst fara at hava eina ávirkan eftir eitt ávíst áramál (t.d. betri og breiðari upplýsing í skúlunum).

## 6. Samanumtøka og niðurstøður

Henda frágreiðingin hevur viðgjørt ta hægst útbúnu arbeiðsmegina, og serliga spurningin, hvat skal til at fáa hesa arbeiðsmegina, oftast búleikandi uttan fyri Føroyar, at velja starv innan fiskivinnuna. Hesin spurningur gerst alt meira viðkomandi, bæði fyri vinnu og samfelag, tí kappingin um høgt útbúnu arbeiðsmegina er í dag ein altjóða kapping, sum kann koma at hava størri týdning fyri okkara samfelagsmenning, enn atgongdin til rávøru og kapital (sí part 2). Tá stórur partur av okkara høgt útbúnu arbeiðsmegi nemur sær hendan kunnleika uttan fyri Oyggjarnar, so er spurningurin um, hvussu hendan arbeiðsmegin kann vinnast aftur av serligum týdningi. Hvørjir eru her okkara kappingarfyrimunir? Liggja teir í teimum høgu lønunum, tí spennandi arbeiðnum, ella eru tað onnur viðurskifti, ið gera seg galdandi?

Frágreiðingin vísir, at tað fyrst av øllum er innihaldið í tí arbeiði, sum bjóðað verður út, ið er avgerandi fyri, hvørt fólk við hægri útbúgving velja at leggja leiðina heim til Føroya ella ikki, og eisini til at taka av einum starvi innan fiskivinnuna (sí part 3). Hóast møguleikin fyri persónligari og fakligari menning eru greitt betri uttanlands, so vísir okkara arbeiði samstundis, at tann høgt útbúni í stóran mun er til reiðar at taka við starvi

í Føroyum, um møguleikin býðst og treytirnar eru í lagi. Hetta er ikki minst tí, at Føroyar eru eitt fakligt "experimentarium" við nógvum spennandi avbjóðingum. Tí liggur tað serliga í viðurskiftum á sjálvum arbeiðsmarknaðinum at finna loysnir til at fáa tey høgt útbúnu at velja fiskivinnuna.

Stóra avbjóðingin liggur í at fáa tvær heilt ymiskar mentanir at møtast, t.v.s. "praktisku" mentanina í dagsins fiskivinnu og "teoretisku" mentanina í útbúgvingar- og granskingarverkinum, og sum í ov lítlan mun virkar lokkandi fyri viðkomandi málbólk. Lýkur hetta nøkur grundkrøv um arbeiðsumstøður og persónliga menning, so økist møguleikin avgerandi fyri at fáa tey hægst útbúnu at taka møguleikan. Tí er tað serliga gjøgnum arbeiðsmarknaðar- og G&M-politikkin neyðugt at styrkja samstarv og samskifti við tey hægst útbúnu (sí serliga part 4).

Av serligum týdningi at taka atlit at er, at hesi fólkini vænta sær arbeiði, sum er: 1) spesialiserað og málrættað, bygt á teoretiskar fortreytir 2) hevur ein ávísan tryggleika í sær viðvíkjandi starvsetan og 3) hevur møguleikar fyri sjálvstøðugum avgerðum og persónligari fakligari menning. Ein møguleiki at læra av og styrkja sambandið við tey hægst útbúnu, er at royna sonevndu "ísbrótaraskipanini", sum – tó innan onnur øki - hevur givið góð úrslit í eitt nú Danmark (sí part 5). Neyðugt er her at taka serligt fyrilit fyri nevndu ynskir til eitt starv.

Í einum breiðari høpi, til tess at vinna ta høgt útbúnu arbeiðsmegina inn í fiskivinnuna, er neyðugt við rekrutteringsátøkum, sum 1) leggja dent á upplýsing til tey, sum fara út at lesa, um møguleikarnar fyri fiskivinnufakum, 2) at lata lesandi hava møguleikar fyri tilknýti til fiskivinnuna gjøgnum lesturin og/ella arbeiða við viðurskiftum af týdningi fyri vinnuna, og 3) at skapa eitt beinleiðis samstarv millum G&M-hvørvi/vinnu og lesandi á hægri stigi gjøgnum eitt nú praktikkskipanir v.m. (sí nærri í parti 5).

Tær lýsingar og niðurstøður, vit her hava gjørt okkum, snúgva seg serliga um rekruttering av málbólkinum: tey hægst útbúnu. Høvuðsdenturin hevur verið lagdur á at finna fram til, hvar trupulleikin liggur, og tað hava vit nú eina rímuliga greiða mynd av. Tað er við støði í hesum, at nevndu uppskot til at styrkja rekrutteringina eru bygd.

Samstundis er greitt, at tá hinar frágreiðingarnar innan Rekrutteringsverkætlanina fyriliggja, hava vit eisini møguleikan at seta hesar niðurstøður og uppskot inn í eina størri heild í spurninginum um rekruttering til fiskivinnuna.

## Keldulisti


| | |
|---|---|
| Arbo, P. 1997. | *Alternative Nord-Norge-bilder*. Perspektiver på regional næringsutvikling. Nytt Norsk Tidsskrift, no. 4. |
| Arbo, P. 1998. | *Flytting og regional ubalanse*. Tromsø. Óprentað. |
| Beck, U. 1992. | *Risk Society. Towards a new Modernity*. Sage Publications. |
| Buciek, K. 1996. | *Fra problem til metode – En casebaseret indføring i anvendelsen af kvalitative metoder til belysning af struktur-agent problematikken*. Roskilde: Roskilde Universitetsforlag. |
| Cervantes, M. and G. Dominique. 2003. | *The Brain Drain: Old Myths, New Realities*. OECD Directorate for Science, Technology and Industry. |
| Glaser, B. G. & Strauss, A. L. 1967. | *The Discovery of Grounded Theory: Strategies for Qualitative Research*. New York: Aldine de Gruyter. |
| Holmen, Ann Karin Tennås. 2002. | *Jenteleir – rekrutteringskime til fiskerinæringen?* Rapport nr. 05/2002. Tromsø: Norut Samfunnsforskning AS. |
| Hovgaard, G. 1998. | *At lesa seg av bygdini – um leiklut skúlans í nútíðar samfelagnum*. Pp. 245-268 í Á. Dahl, Føroya Lærarafelag 100 ár 1898-1998. Bókadeild Føroya Lærarafelags. |
| Hovgaard, G. 2001b. | *Økismenning á beina kós*. Arbeiðsrit nr. 1/2001. Klaksvík. Granskingarverkætlanin fyri Økismenning. |
| Hovgaard, G. 2001a. | *Globalisation, Embeddedness and Local Coping Strategies. A comparative and qualitative study of local dynamics in contemporary social change*. Roskilde: Roskilde University. |
| Jamtøy, Ann Iren. 2002. | *Utdanninngsvalg og framtidsutsikter – en markedsundersøkelse blant elever og studenter som har valgt fiskeri- og havbruksnæringa som utdanningsvei*. Sentio as. Fiskerinæringens Kompetansesenter. |
| Reeh, L. og Bøttcher, T. | *Daværende isbryderordning en kæmpe succes*. |

| | |
|---|---|
| 2003a. | Magisterbladet nr. 2. |
| Reeh, L. og Bøttcher, T. 2003b. | *Isbryderordning skal genoplives i ny og forbedret udgave*. Magisterbladet nr. 2. |
| Reinert, R. 2000. | *Fiskivinnan og lærda fólkið*. Hugin & Munin 2002/3. Klaksvík. Granskingarverkætlanin fyri Økismenning. |
| Simonsen, B. 2000. | *Jagten på selvet*. Tema om ungdom og uddannelse 2. Nyhedsbrevet. Center for Ungdomsforskning. http://www.cefu.dk/nyhedsbrev/nr1/ |
| Strauss, A. & Corbin, J. 1990. | *Basics for Qualitative Research: Grounded theory procedures and techniques.* |

**Fylgiskjal 1.**

# Viðtalsleiðbeining

## "Rekruttering til fiskivinnuna"

**Frágreiðing til informantar**

Ein avgerandi fyritreyt fyri eini nútímans menning av føroysku fiskivinnuni, liggur í spurninginum um, hvørt tað er møguligt at rekruttera fólk við hægri útbúgvingum inn í vinnuna. Fiskivinnan má mennast til at gerast ein "vitanarvinna", har alt meira má fáast burtur úr tí tilfeinginum, fiskurin er. Við hesum meinast ein vinna, har meira verður gjørt við menna marknaðir, nýggju møguleikarnar innan biokemiskan og annan hátøkniligian ídnað, umframt almennu/privatu stýringina av vinnuni (tilfeingisstýring; menningarskipanir vm.). Ein máti at finna fram til, hvat skal til at slúsa fólk yvir í tílíkar alment/privatar vinnuvegir, er at spyrja tey fólk, sum í dag kundu verið í hesum vinnum, men ístaðin hava valt aðrar lívsleiðir, herundir at búseta seg uttanlands.

Vit halda, at tú umboðar ein tílíkan persón, og takka fyri, at tú vil taka tær tíð til hesa samrøðuna. Allar upplýsingar, tú gevur okkum, verða sjálvsagt viðgjørdar í trúnaði, og viðgerðin av hesum upplýsingum verður sjálvsagt gjørd á ein tílíkan hátt, at tær ikki kunnu leiðast aftur til nakran ávísan persón.

# Spurnarblað

Byrjan: greið stutt frá verkætlanini, lova informanti trúnað í tí, viðkomandi sigur, og greið stutt frá, hvat slag av viðtali, talan er um (tvs. kvalitativt – opin viðtalsformur).

1. partur: Persónligar upplýsingar

1) Aldur, útbúgving og starv.

2) Sivilstøða (gift(ur)), børn v.m.

3) Greið frá tíni bakgrund í Føroyum!
    a. Hvar ert tú fødd/-ur og uppvaksin?
    b. Hvør er bakgrundin hjá foreldrunum?
    c. Hvørja sosiala støðu?
        i. Álitisstørv, jarðarognir v.m.

4) Hvat tókst tú við í heimbýnum/bygdini?
    a. Lesnaður
    b. Arbeiði
    c. Frítið
    d. Annað
        i. Serligur áhugi, sum onnur ikki tókust við?

**2. partur: Val av útbúgving!**

5) Greið frá innihaldinum í tíni útbúgving
    a. Endamál, spesialisering?
    b. Hvørja spesialisering hevur tú og hví júst hesa spesialisering?
6) Kanst tú greiða frá, hví tú valdi júst hesa útbúgvingina?
    a. Ávirkanin, hvaðani kom hon
        i. foreldur, vinfólk, lærari ella tilvildarlig?
    b. Hevur tú skift útbúgving nakrantíð?
        i. Um ja, hví?

**3. partur: Núverandi starv (eisini um viðkomandi er lesandi)**

7) Hvat er títt núverandi starv?
8) Hvussu fekst tú hetta starv, og hvussu longi hevur tú havt tað?
9) Hví valdi tú júst hetta starvið?
10) Ætlar tú at vera verandi í hesum ella líknandi starvi?

**4. partur: Hvat við Føroyum?**

11) Hevur tú ætlanir um at flyta aftur til Føroya?
    a. Spurningar tillagast, alt eftir um svarið er ja ella nei.
12) Nær hevur tú tikið hesa avgerð

   a. hvat er(u) orsøkin(-irnar)?

13) Hevði tú trivist í Føroyum, um tú flutti í dag?
   a. hví/hví ikki?
14) Kundi tú brúkt títt núverandi starv í Føroyum?
15) Hvat skal til, fyri at tú skuldi flutt til Føroya?
16) Hvat heldur tú hevur ávirkan á, um tey við hægri útbúgving flyta til Føroya ella ikki
   a. Løn?
   b. Ávirkan á CV og framtíðar starvsmøguleikar?
   c. Teirra persónaliga net í Føroyum?
   d. Sosiala, mentanarliga, politiska lívið í Føroyum.

**5. partur: Fiskivinnan (Hesir spurningar eru kanska longu svaraðir frammanfyri, men eiga her at útdýpast).**

17) Er tú uppvaksin í einum fiskivinnuumhvørvi?
18) Hevði fiskivinna nakað at siga í tíni skúlagongd?
19) Hevur tú nakrantíð arbeitt í fiskivinnu
   a. hvat, nær, hvussu longi?
20) Hvør hugburður til fiskivinnu vóru ráðandi heima ella í umhvørvinum hjá tær?
21) Hvussu ávirkaði hesin hugburður teg?
22) Hevur tú nakrantíð hugsað um at fáa tær eitt starv, sum hevur við fiskivinnu at gera
   a. Hvat slag av starvi skuldi hetta so verið?
23) Við tínari bakgrund, hvørjar møguleikar sært tú í føroysku fiskivinnuni?
24) Kundi tú møguliga sjálv/-ur hugsað tær at byrjað eitt virki við tilknýti til fiskivinnuna?
25) Hvat heldur tú, kundi verið gjørt fyri at fingið føroyingar at vent sær móti føroysku fiskivinnuni?
   a. Tað almenna?
   b. Vinnan sjálv?

**6. partur: Samanumtikið.**

26) Hvørjar orsøkir tala sum heild fyri at flyta heim?
27) Hvørjar orsøkir tala sum heild ímóti?

Gev informanti møguleika at koma við tí, sum viðkomandi kanska hevur upp á hjarta, men ikki fingið høvi til at sagt. Takka fyri.